| **Heiti á verkætlan**:<br>Fiti í makreli (FVG nr. 11/01437) | **Ár byrjan og endi**:<br>2012 |
|---|---|
| **Skrivað hevur**:<br>Navn:<br>Stovnur ella virki:<br>t-postur: | <br>Jan Arge Jacobsen<br>Havstovan<br>janarge@hav.fo |

**Endamálið við verkætlanini**:

Endamálið var at kanna, hvussu nógv innihaldið av fiti veksur, frá tí at makrelurin kemur í føroyskan sjógv um várið aftan á gýtingina longur suðuri, til hann fer úr aftur føroyskum øki út á heystið. Eisini skuldi kannast, hvussu nógv vektin økist í hesum tíðarskeiðinum. Kanningin varð gjørd í samstarvi við p/f Kollafjørð Pelagic.

**Samandráttur av úrslitum**:

Aftan á gýtingina um várið, leitar makrelurin norðureftir og eisini vestureftir at finna sær føði. Tá kemur hann millum annað í føroyskan sjógv frá mai til út á heystið, har hann fitar seg upp til veturin, tá hann mest sum fer í dvala eins og norðhavssildin.

Kanningin vísti, at í tíðarskeiðinum, meðan hann er í føroyskum øki, fleirfaldast innihaldið av fiti frá umleið 5% í mai til yvir 25% í august. Serliga er tað um mánaðarskiftið juni-juli at innihaldið av fiti veksur (Mynd 1).




*Mynd 1. Innihald av fiti (%) í makreli pr. viku í føroyskum øki í 2011 og 2012 frá mátingunum hjá Havstovuni og Kollafjørð Pelagic. Linjurnar eru miðaltøl (rullandi miðal hvørja triðju viku).*

Fitikanningarnar geva bert vitan um lutvísa innihaldið av fiti hjá einstaka fiskinum. Tískil er eisini kannað, hvussu nógv fiskurin veksur í vekt meðan hann er í føroyskum øki. Hesar kanningar vísa, at 3-6 ára gamal makrelur vigar eini 150-200 g. meiri, tá hann fer úr aftur føroyskum øki, samanborið við tá hann kemur í økið (Mynd 2). Hetta svarar til at vektin í miðal øktist 63% í 2012. Tilsvarandi kanningar í 2011 vístu eina øking á 58%, meðan miðal fyri bæði árini er 61%.

Kanningarúrslit sum hesi kunnu nýtast beinleiðis av umsitingini í fiskivinnumálum sum grundgeving fyri føroyskum rætti til tilfeingið av makreli.




*Mynd 2. Vektøking (g) av 4-6 ára gomlum makreli frá viku 17 (síðst í apríl) til viku 37 (miðskeiðis í september) í 2012 í føroyskum øki. Tilsamans knapt 1500 fiskar vóru vigaðir og aldurin lisin í hesum kanningunum.*

Havstovan fekk játtað kr. 100.000 frá Fiskivinnugransking til hesa verkætlanina í 2012. Felagið Nótaskip var við til at fíggja ein "feittmetur" mátara til kanningarnar og í 2011 gjørdi p/f Kollafjørð Pelagic mátingarnar av fiti av hvørjari landing frá uppsjóvarskipunum at lata okkum til kanningarnar.

Gunnvør Joensen frá Havstovuni og Marita Højgaard frá p/f Kollafjørð Pelagic stóðu fyri kanningunum í 2011, meðan Jens Arni Thomassen og Poul Vestergaard á Havstovuni gjørdu kanningarnar í 2012.

| | |
|---|---|
| **Váttan frá verkætlanarleiðara**: | Jan Arge Jacobsen  Tórshavn 23/2 2016 |